Myndir: Jens Kristian Vang

Nú hava vit hann her

Risatrolarin, sum eitt felag, har JFK Trol er uppií, hevur leiga› úr Noreg, kom á Klaksvík hóskvøldi›. Tá skipi› fer til fiskiskap, ver›a 80 fólk vi›. Ta› sama sum b‡r í Mikladals Kommunu

EDVARD JOENSEN

Tann trá›i útnyr›ingurin fekk mannfjøldina á Kósabrúnni at skultra og krúpa saman aftan fyri bilarnar og í teimum opnu hur›unum, har arbei›sfólki› á flakavirkinum var komi› at hyggja at hesum n‡ggjasta farinum í føroyska flotanum.

Ikki tí tey vænta sær naka› arbei›i frá hesum skipinum. Ætlanin vi› Nærabergi er at fiska svartkjaft undir Føroyum at gera surimi burtur úr. Og ta› ver›ur alt gjørt umbor›.

Hóast framman undan hevur veri› tosa› nógv um, hvussu stórur hann er, var ilt at meta um støddina, tá hann í myrkrinum kom glí›andi inn eftir Klaksvíkini.

Hann kom spakuliga fram vi› Kósabrúnni, har alt fleiri fólk savna›ust at taka ímóti. So ste›ga›i hann líkasum á, me›an Dúgvan fór strúkandi út av vágni tætt fram vi› brúnni.

Ta› var kalt at standa á Kósabrúnni og síggja hendan øgiliga kroppin mala runt á vágni. Sjó›i› frá bógskrúvum hoyrdist fram um bilmotorar og fólkatos á brúnni, har mett var› um, hvussu nógv dekk hann mundi hava, og hvussu høgur hann var. Men ivaleyst var, at skipi› var hægri enn Kósavirki›. Ta› vóru klaksvíkingar samdir um.

Hann nærka›ist spakuliga brúnni eftir li›. KG 14 Næraberg Klaksvik. Ja uttan striku yvir ínum, sum hann annars átti at havt. Men kanska er ta› tí, at skipi› bara er leiga› í tvey ár og framvegis er útlendskt, var onkur, sum helt.

Fólk vóru so smátt farin at skotttast eftir, hvar móttøkunevndin mundi vera. Men har var eingin. Eitt sindur kollut var› hildi›. Væl var hetta eitt brúkt, leiga› skip, men klaksvíkingar hava útnevnt ta› til flaggskipi› í flotanum, so har átti at veri› gjørt okkurt burturúr.

Jú, hann, sum situr á almenna kassanum stó› naka› frammalaga í mongdini, vóru fleiri, sum løgdu merki til. Karstin Hansen, landsst‡risma›ur, var komin at taka ímóti. Men ta› var nú sum privatpersónur. Hann var›ar av onkrum, sum hevur eitt or› at siga umbor›, skilst.

Men smádreingirnir vóru sær sjálvum líkir. Teir bí›a›u ikki eftir nakrari sendinevnd, sum ikki kom. Ta› var tann tí›, tá smádrongur ikki var naka›, uttan hann droymdi um at gerast skipari. Og ta› skuldi helst vera á tí størsta skipinum, sum til var. So her var møguleikin. Har stó›u teir á ra› og bí›a›u, me›an skipsmenninir festu landgangin og spentu endarnar framvi›. Men fyrsta gangandi var, og tollarin so dánt var sloppin umbor›, tusti allur flokkurin upp á skipi›.

Eitt kavaæl stó› so hóttandi har úti í myrkrinum og fekk mannamúgvuna á bryggjuni at krúpa enn meira saman. So best var helst at sleppa sær umbor› sum skjótast at síggja skipi›. Har er ivaleyst eisini l‡ggjari, ver›ur hildi›.

Og hóast skipi› er rættiliga stórt og langt um at fara, gjørdist skjótt trongligt í øllum trappunum. Tí dekkini eru nógv at vitja og trappurnar eru sum vanligar umbor› á skipi. Brattar og trongar. Støddin noktar seg heldur ikki. Gongirnar minst líka langar sum á Sjómansheiminum vi› hur›um bá›umegin. Men Harragud. Har skulu 80 fólk búgva umbor›, tá fari› ver›ur til fiskiskap, so ta› má vera sum eitt hotel.

Tann, sum hevur veri› umbor› á føroyskum trolarum seinni árini, kennir brúnna aftur allasta›ni. Og brúgvin á Nærabergi líkist ikki frá teimum, sum nógvir føroyingar kenna. Hon er stór sum eini vanlig sethús vi› allari tí útger›, sum nútí›in krevur til fiskiskap.

»Eg havi talt 60 fólk inni«, seg›i ein vitjandi, »og tey síggjast ikki aftur.«

Men tá hugt var› út gjøgnum vindeyga›, fekst ein kensla av, at vit vóru høgt uppi. Væl oman fyri mønuna á Kósavirkinum.

Manningarrúmini eru stór, sum vera man. Messan man hava væl fleiri sitipláss enn Shanghai, har klaksvíkingar plaga at fáa sær ein bita solei›is av og á. Og stór sjónvarpsstova var eisini at síggja, har fólk kunnu stytta sær stundir á frívaktini.

Naka› langt er av brúnni ni›ur í maskinrúmi›. Men ikki kann sigast, at maskinrúmi› var naka› upplivilsi hjá tí, sum kennir tey vanliga sera væl hildnu føroysku maskinrúmini. Men kanska fer at hjálpa, nú hesir menninir, sum hava kela› og kínt maskinunum á føroyskum skipum, fara at taka yvir.

Ja, nú er Næraberg komin, nú hava vit hann her.

Men ta› var vi› eini kenslu av, at helst hevur alt hetta tosi› um hendan risan, sum tóktist at vera naka› heilt serligt í skipasøguni, veri› í so avgjørt.

Eitt stórt skip, sum líkist flestu ø›rum skipum, uttan ta›, at ta› veruliga er longri og hægri enn onnur føroysk fiskiskip.

Ta› ver›ur ste›ga› á eitt andarhald í lúkuni, á›renn fari› ver›ur ni›ur aftur eftir landganginum. Teir flestu bilarnir, sum vóru á Kósabrúnni, tá skipi› kom, eru burtur. Útnyr›ingurin hevur ment seg, ta› kenst óf‡si at standa aftur á bryggjuni.

Skulu vaksa um vir›i› á svartkjaftinum

Royndirnar vi› Nærabergi skulu brúkast til at vísa ø›rum, at fiskurin, vit lata fyri kvotu í Barentshavinum, er seldur ov bíliga, sigur stjórin í JFK Trol

Vit skulu prógva at vit hava selt svartkjaftin ov bíliga, sigur Hanus Hansen, stjóri í JFK Trol

EDVARD JOENSEN

Næraberg skal brúkast til at prógva, at svartkjafturin hjá føroyingum hevur meira vir›i, enn vit fyri hava fingi› fyri hann, sigur Hanus Hansen, stjóri í JFK Trol í Klaks-vík.

Hóast svartkjaftavei›a ikki er tann traditionella vinnan hjá Kjølbrotrolarunum, sum teir vanliga hava veri› nevndir, heldur Hanus Hansen ikki, at hetta fer at b‡ta høvdi› av vei›ini í Barentshavinum. Tvørtur í móti heldur hann, at vi› at vísa á, at ta› ber til at vinna pening burtur úr svartkjaftinum, fáa vit ein eyka trumf í hondina, tá kortini skulu gevast næstu fer›.

Næraberg er stórt skip vi› stórum kapaciteti. Surimiverksmi›jan umbor› klárar at gera 75 tons um samdøgri›. Men ta› væntar stjórin ikki, at flakamaskinurnar klára at skera. Ta› velst alt um støddina á fiskinum.

Hanus Hansen sigur, at skipi› skal fiska fyri 90-95 milliónir fyri at bera seg. Og ta› heldur hann vera realistiskt at rokna vi›.

Hanus Hansen sigur, at komandi tvey árini aftrat ver›ur svartkjafturin ókvotera›ur, og so er bara at dríva á at fiska alt ta›, til ber. Um tvey ár gongur leigusáttmálin um Næraberg út, men tá eigur at bera til at vita, um hendan vei›an RØKKUR til at reka skipi› rentabult.

Hanus Hansen vil ikki siga, hvussu nógv skipi› ver›ur leiga› fyri.

Ta› er eitt n‡tt felag, sum leigar skipi›. Ta› er líkasum fyri at halda JFK Trol uttanfyri, sigur Hanus Hansen. Føroyingar eiga tveir tri›ingar av partapeninginum og nor›menn ein, sigur hann. Hetta felagi› skal so leiga skipi› í tvey ár. Sí›an kann hetta felagi› - ella okkurt anna› - keypa skipi›, sigur stjórin í JFK Trol.

Hanus Hansen tr‡r upp á, at hóast ta› ikki fyrr hevur bori› til at fáa lønandi vinnu burtur úr at vei›a svartkjaft til matna, eigur ta› at fara at ganga nú. Ta› áliti› grundar hann á, at teir menninir, sum fylgja vi› skipinum, duga at útnytta tilfeingi›. Ta› vil siga nor›menn og amerikanarar, sum duga at brúka maskinurnar og vi› sínum royndum fáa tær til at geva ta› optimala.

»Vit hava ongantí› fyrr havt eitt tól, sum hevur veri› kappingarført á økinum«, sigur Hanus Hansen. »Men ta› hava vit nú fingi› vi› hesi loysnini«, heldur hann.

Stjórin í JFK Trol noktar fyri, at teir bara eru strámenn hjá einum nor›manni, sum er komin í ney› av einum skipi.

»Vit fáa nógv burtur úr hesum«, sigur hann.

Hanus Hansen metir, at um føroyingar um tvey ár duga at fáa surimi burtur úr svartkjaftinum, hava vit fingi› rættiliga nógv burtur úr og hava so ikki brúk fyri nor›monnum meira. Men hann sigur tó, at teir høvdu ikki gjørt hesa royndina uttan vi› norskari hjálp.

»Føroyingar høvdu ikki klára› hetta einsamallir«, sigur stjórin í JFK Trol. »Nú ver›ur fari› undir royndirnar vi› avmarka›um tapsvanda, júst tí at nor›menn eru vi›«.

Skipi› er stórt. 94 metrar langt, 13,40 metrar breitt og er merkt 3.760 brutto tons. Til sammetingar kann nevnast, at Skálaberg og Sundaberg eru 2.380 brutto tons, sigur Hanus Hansen. Næraberg hevur 8.400 hk maskinorku. Ta› ver›a 80 fólk vi›, sigur stjórin. 65 teirra ver›a føroyingar, og av teimum ver›a aftur eini 6-8 konufólk.

Myndir: Jens Kristian Vang

3arin søkir 3 fólk

Lærling til fotodeild okkara

Lærutíðin er 3 ár og tú mást hava FHS.
Í lærutíðini skalt tú í skúla í Odder í Danmark nakrar ferðir - og tú luttekur eisini í innanhýsis skeiðum hjá okkum.

Vit vænta:
- At tú helst hevur koyrikort og góðan kunnleika til EDV/KT
- Hevur áhuga fyri foto og ert fyrikomandi og ágrýtin
- Hevur lætt sinnalag.

Vit bjóða:
- Løn eftir nærri avtalu
- Gott arbeiðsumhvørvi, við einum ungum dynamiskum liði av arbeiðsfelagum.

Lærling til fløgudeild okkara

Lærutíðin er 3 ár og tú mást hava FHS.
Í lærutíðini skalt tú í skúla í Danmark nakrar ferðir - og tú luttekur eisini í innanhýsis skeiðum hjá okkum.

Vit vænta:
- At tú helst hevur koyrikort og góðan kunnleika til EDV/KT
- Hevur áhuga fyri tónleiki, tøkni og ert fyrikomandi og ágrýtin
- Hevur lætt sinnalag

Vit bjóða:
- Løn eftir nærri avtalu
- Gott arbeiðsumhvørvi, við einum ungum dynamiskum liði av arbeiðsfelagum.

Fólk søkist til EDV deild okkara

3-arin vil fegin hava fatur á tær um tú hevur áhuga at arbeiða saman við einum ungum og dynamiskum liði, har tú fært møguleika at royna eitt sindur av hvørjum innan eina vinnu, ið er í framgongd hvønn dag.

Vit vænta at tú ert:
- fyrikomandi og smílandi
- Tænastuvinarlig/ur
- Vælkunnað/ur innan EDV og hardware og hevur hollan kunnleika innan internet
- Áhugað/ur innan alt sum eitur software og spøl
- Sjálvstøðug/ur

3-arin arbeiðir sum eitt lið, men sum samstundis er skapt av einstaklingum, ið fáa møguleika at vísa hvat tey kunna. Vekir hetta tín áhuga, so send eina umsøkn.

Hondskrivað umsøkn verður send til okkum **innan 20. mars 2000.** Størvini skulu setast 01. apríl 2000.

**3'arin
SMS
Att.: Gissur Patursson
Postboks 1057 - 1058
FO 110 Tórshavn**

3arin

SMS • Tel. 31 98 20 - 31 06 06 • Fax 31 49 55
E-mail: tryarin@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820